Aksel V. Johannesen
løgtingsmaður

Nr. 48/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um vaktarvirksemi, settur løgmanni, Bárði á Steig Nielsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hevur løgmaður ætlanir um at fara undir at gera eina lóg um vaktarvirksemi í Føroyum?
2. Um so er, nær er ætlanin at fara undir hetta arbeiðið?
3. Hvørjar treytir hevur løgmaður ætlanir um at seta í eini møguligari vaktarlóg?

Viðmerkingar:
Hóast vit í Føroyum hava lágan kriminalitet, hava vit eins og aðrastaðni í heiminum tørv á vaktarfólki, sum halda vakt við bæði almennum og privatum bygningum. Í Føroyum hava vit vinnuligt vaktarvirksemi og nógv fólk, sum starvast sum vaktarfólk. Kortini hava vit onga vaktarvirksemislóg, og harvið ongar treytir fyri, hvørjar førleikar eitt vaktarfólk skal hava fyri at kunna røkja starvið.

Hyggja vit til dømis til Danmarkar, so hevur lóg um vaktarvirksemi verið galdandi í nógv ár. Henda lógin ásetir m.a., at vaktarfólk skulu hava góðkenning. Fyri at verða góðkend, skulu tey lúka ávísar treytir, m.a. hava reina revsiváttan, og løgmaður kann harafturat seta nærri treytir fyri krøv til útbúgving, útgerð o.a.

Eitt vaktarfólk, sum hevur útbúgving innan vaktarvirksemi, er m.a. skúlað í ósemjuhandfaring og hevur serliga vitan um, hvussu ein ber seg at í vandastøðu, har persónar kunnu vera til ampa fyri seg sjálvi ella onnur. Tí kundi harafturat eisini verið áhugavert at kannað, um grundarlag er fyri at seta á stovn útbúgving ella skeið innan vaktarvirksemi í Føroyum.

Á Løgtingi, 28. januar 2020

Aksel V. Johannesen